

*Beinta hevði ikki hildið á byrsu áður og bert skotið seks royndarskot, áðrenn hon fór at skjóta harur. Hon fekk tríggjar*
*Eginmynd*

Fríggjakvøldið undan fóru hon og sambúgvin hjá mammuni so oman á keiina fyri at læra seg at skjóta.

- Eg havði ongantíð skotið fyrr. Bara við luftbyrsu eftir plastrósum á stevnum, ikki við rættiligari byrsu. Eg prøvaði at skjóta seks skot, men so máttu vit gevast, sigur Beinta Beinisdóttir.

So skuldi slagið standa. Fyrsta skotið var skeivt, men so bragdaði.

- Fyrsta haran, sum eg skjeyt, sat still. Eg má hava verið nakað spent, tí tá eg hevði skotið hana, rystist eg sum eitt bókablað, sigur Beinta Beinisdóttir.

Dagurin gjørdist góður fyri havnardamuna. Hon kom til húsar aftur við trimum harum, og tað var meiri enn onkur annar hevði fingið.

## Heim til jóla

Hinumegin jørðina eru árstíðirnar umvent sum her hjá okkum. Har halda tey jól á hásumri, og tað kann vera ilt hjá okkum at ímynda okkum.

Tað merkir eisini, at tá Beinta fær summarfrí frá universitetinum tá vit hava vetur, og kemur statt heim til jóla í summarfrí.

- Sjálvandi eru jólini ein stórur partur av tí. Hetta er eisini fyrsta ferð í trý ár, at eg, mamma og beiggi mín halda jól saman, so tað verður nakað serligt, sigur Beinta Beinisdóttir.

Jólini standa nú av álvara fyri durðum, men hóast Beinta skjeyt tríggjar harur, verður tað ikki steikt hara, sum boðreitt verður við um jólini. Tað verður meiri traditionellur jólamatur, og so verður haruveitslan seinni, einaferð í januar mánað.

Skúlin byrjar aftur í februar, so tað verður góð tíð at innheinta tað forsømda við vinum og kenningum.

- Tað er nakað, tú saknar, tá tú ert so langt burturi, sigur Beinta Beinisdóttir.

Universitetið í Brisbane, har Beinta gongur, er eitt av teimum størstu í Australia, men á deildini hjá Beintu ganga tó bert umleið 500 næmingar.



*Beinta Beinisdóttir gongur á universitetinum í Brisbane í Australia, har hon lesur fotojournalistikk*
*Mynd: Álvur Haraldsen*